<u>Rókin til Dals</u>

Lag: Niklas hjá Pena

Eg búgvi norði á landi, og ætlaði mær ein lítlan túr;
eg kósina setti móti Sandi, har er jú so vøkur natúr,
og oynna eg koyrdi á tremur, líka frá fjøru til fjals,
har, sum bilur fram kemur, til síðst fór eg eystur til Dals.

Mín grøni volvo var høgur, motorurin sera væl gekk.
Um hansara trygd gingu søgur og spildurnýggj vetrardekk.
So vakurt er vegastrekkið,; hetta var vitanin mín,
Av ræslu eg meig í betrekkið, tá vegurin kom fram um sýn.

Tí vegur er skeivur ei beinur, smalur sum lomvigarók,
úr erva har rullaði steinur og fast í bilsíðu tók.
Vegurin fullur av gróti, sum sorlaði bilin hjá mær,
tá Dalsbygd eg kom ímóti, var volvo eitt lasafar.

Eg seldi bilin í Dali, bleiv brúktur at tekja ein hjall,
mín tøkk fór mót himnasali, so gekk eg um Stórafjall,
Um fólkið eg gruni og teinki, tey búgva í hesari bygd,
tað gjørt verður lítið og einki, so tey kunnu koyra trygt.

Jónleif Johannesen